# Líkist púra ongum

**Tað sum tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin gjørdu í Løgtinginum fríggjadagin, hoyrir ongastaðni heima, sigur løgtingsformaðurin**

BOYKOTT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað, sum tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin gjørdu í Løgtinginum fríggjadagin, hoyrir ongastaðni heima.

Edmund Joensen, løgtingsformaður heldur ómetaliga lítið um atburðin hjá tjóðveldisflokkinum í løgtinginum fríggjadagin.

Tá ið Løgtingið skuldi atkvøða um báðar yvirtøkulógirnar, noktaðu tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin at taka lut í atkvøðugreiðsluni.

Flokkurin boykottaði sostatt atkvøðugreiðsluna og tingarbeiðið og lógirnar vóru tískil avgreiddar, uttan at tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin vildu taka lut



*– Tað, sum hendi í Løgtinginum fríggjadagin, er eitt óvanliga óheppið signal at senda frá Føroya Løgtingi, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður*

í atkvøðugreiðslunum.

– Hetta er ein óskikkur av ringasta slagi, er skoðsmálið, sum atburðurin hjá teimum báðum andstøðuflokkunum fær frá løgtingsformanninum.

## Bróta sínar egnu reglar

Hann sigur, at løgtingið hevur reglar at ganga eftir, sum allir tingmenn sjálvir hava samtykt.

Eg haldi, at Løgtingið átti at gingið á odda at hildið sínar egnu reglar, heldur Edmund Joensen.

– Hann sigur, at tingskipanin sigur týðiliga, hvussu farast skal fram í Løgtinginum og tað er brot á tingskipanina, at flokkar boykotta eina atkvøðugreiðslu.

Tað stendur í tingskipanini, at tingmenn skulu geva seg undir ræðið formansins so tá ið formaðurin biðjur teir atkvøða, skulu teir gera tað.

– Tað stendur eisini, at tingmenn skulu atkvøða antin ja ella nei, ella skulu teir trýsta á tann triðja knøttin sum sigur, at teir atkvøða ikki.

Edmund Joensen heldur ikki, at tað kom teimum, sum samtyktu tingskipanina, til hugs, at tað yvirhøvur kundi koma fyri, at ein flokkur beinleiðis skuldi boykotta eina atkvøðugreiðslu.

Undir gomlu skipanini hevði eitt slíkt boykott ikki kunna latið seg gjørt, tí tá skuldi tingmenn reisa seg, táið teir atkvøddu ja ella nei og teir sum ikki atkvøddu, vórðu sitandi.

Tað, sum hendi fríggjadagin er ein keðilig hending, sum formansskapurin fer at taka upp til umrøðu.

Kortini heldur hann at tað er rættiliga ivingarsamt, hvat er at gera við slíka framferð.

– Tað, sum hendi fríggjadagin var at misbrúka skipanina, tí hetta er beinleiðis at boykotta hana.

## Óvanliga keðiligt signal

Edmund Joensen heldur, at hetta er eitt óvanliga keðiligt signal, sum Føroya Løgting, sum átti at verið eitt fyridømi, við hesum sendir almenninginum.

– Tað kann verða vandi fyri, at onnur spyrja, hví tey skulu halda lógir og reglar, tí ið sjálvt Løgtingið, brýtur sínar egnu reglar.

Edmund Joensen sigur, at Løgtingið skuldi gingið á odda sum eitt gott fyridømi og at slíkt kemur fyri einaferð, er einaferð ov ofta.

# Vit tóku eina kontanta avgerð

**– Tað, sum vit gjørdu í Løgtinginum fríggjadagin, var vánaligur tingsiður. Men tað var alt annað í hesum máli eisini, sigur Hergeir Nielsen**

BOYKOTT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg skal vera tann fyrsti at ásanna, at tað, vit gjørdu fríggjadagin í Løgtinginum, var vánaligur tingsiður.

Hergeir Nielsen er sjálvur næstformaður í Løgtinginum. Men saman við restini av tjóðveldisflokkinum og miðflokkinum boykottaði hann atkvøðugreiðslurnar um vyritøkulógirnar.

Sjálvur kallar Hergeir Nielsen tað eina kontanta avgerð.

Og hóast hann ásannar, at hetta var vánaligur tingsiður, var hetta bara ein vánaligur endi á eini tingviðgerð, sum hann heldur var eitt skúladømi um vánaligan tingsið allan vegin ígjøgnum.

– At boykotta atkvøðugreiðsluna var okkara máti at vísa okkara stóru misnøgd við tað, sum samgongan hevur staðið á odda fyri í hesum máli, sigur Hergeir Nielsen.

## Skrumblað ígjøgnum

Hann heldur at yvirtøku-



*– Tað sum vit gjørdu í Løgtinginum fríggjadagin, var okkara máti at vísa okkara ónøgd uppá, sigur Hergeir Nielsen, løgtingsmaður og næstformaður í Løgtinginum*

lógirnar eru týdningarmestu lógirnar, sum hava verið til viðgerðar í Løgtinginum seinastu 50 árini.

Tí heldur hann, at málini høvdu uppiborið eina námgreiniliga og allýsandi viðgerð í løgtinginum.

Men tey fingu alt annað, staðfestir hann.

– Málini eru skrumblað ígjøgnum løgtingið og tað er eisini út av lagi vánaligur tingsiður, sigur næstformaðurin í Løgtininum.

Hann sigur, at í fyrsta lagi varð málið lagt ov seint fyri tingið og tí mátti tað hava undantaksloyvi, tað vil siga, undirskriftirnar frá 17 tinglimum fyri at tað yvirhøvur kundi leggjast fra.

– Í øðrum lagi skeyt sjálvstýrisflokkurin upp at ein serlig nevnd við umboðum úr øllum flokkurin varð sett at viðgera málið. Annars skuldi málið viðgerast í uttanlandsnevndini og har hevur sjálvstýrisflokkurin onki umboð.

Hergeir Nielsen sigur, at tað sýtti samgongan fyri og sostatt var tann eini flokkurin útihýstur frá at sleppa við at viðgera so týðandi mál.

Í triðja lagi sýtti uttanlandsnevndin eisini fyri at innkallað serfrøðingar, sum andstøðan vildi hava greiða nevndina frá sínum sjónarmiðjum.

– Talan var um ein íslendingin, Gudmund Alfredsson, sum er ein hin fremsti serfrøðingum í fólkarætti í heiminum og vit hildu, at tað var alneyðugt at fáa ein slíkan serfrøðing at greiða frá sínum sjónarmiðjum, men tað varð altso noktað.

Í fjórða lagi hevur løgtingsskrivstovan eisini gjørt vart við, at tað, sum Løgtingið var í ferð við, var ógvuliga ivingarsamt, men heldur ikki tað varð tikið til eftirtektar.

## Út av lagi vánaligur tingsiður

Hergeir Nielsen sigur, at eftir hansara tykki er tað, sum er farið fram í málinum út av lagi vánaligur tingsiður.

– Tað má sigast at vera stak vánaligur tingsiður av samgonguni at tvinga sín vílja ígjøgnum og at skúgva andstøðuna og annars øll ivamál til viks í einum so týðandi máli.

– At skrumbla so týðandi mál ígjøgnum eftir einari viku, uttan at lýsa tað til fulnar, er sera vánaligur tingsiður og hevði ikki sømt seg nøkrum tingi yvirhøvur.

Tí kvitteraði tjóðveldisflokkurin við at boykotta atkvøðugreiðsluna.

– Hetta var okkara íkast til tann stak vánaliga tingsiðin, sum eyðkendi alla málsviðgerðina, sigur Hergeir Nielsen.

– Eg dugi ikki at síggja, hvussu andstøðan skal vísa góðan tingsið, tá ið samgongan gongur á odda at vísa vánaligan tingsið- við vælsignlisi frá sjálvum løgtingsformanninm, sum skal tryggja, at góður tingsiður verður hildin.

Hann ásannar, at virðingin fyri Løgtinginum úti í samfelagnum, fær sjálvsagt ein snudd av slíkum.

– Men tað má so vera, tí í heum máli gjørdu vit av at markera, at tingarbeiðið er farið av kós og tað verður ikki verri av at vit boykottaðu atkvøðugreiðsluna, sigur Hergeir Nielsen.

# Berg Motors keypt D.B. Bilar




*Derek Brockie hevur selt fyritøkuna D.B. Bilar til Berg Motors. Derek hevur verið 40 ár í bilbransjuni. Hann fór í læru sum bilmekanikari hjá Frits Jensen í Gundadali í 1965, og hevur hann arbeitt við bilum síðan tá*

Mynd: Jens Kristian Vang

**Bilfyritøkan Berg Motors hevur keypt eina aðra bilfyritøku, D.B. Bilar, frá Derek Brockie, sum hevur rikið fyritøkuna í J. Bronsksgøtu síðan 1973. D.B.Bilar umboðar bilmerkini: Kia, Rover, Land Rover, MG, Subaru, og Daihatsu**

FYRITØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Berg Motors hevur yvirtikið bilfyritøkuna D.B. Bilar. Derek Brockie, frá D.B. Bilum sigur, at gongdin allastaðni vísir, at fyritøkur leggja saman í størri eindir. Bilverksmiðjurnar seta stór krøv til bilasølurnar. Um hann skuldi hildið fram við fyritøkuni, mátti hann gjørt so stórar íløgur í tøkniligan útbúnað, at tað hevði verið ringt at fingið raksturin av fyritøkuna at hingið saman.

Berg Motors hevur keypt fyritøkuna og umboðini, men ikki bygningarnar í J. Broncksgøtu.

Starvsfólkini hjá D.B. Bilum koma at halda áfram. Støða er enn ikki tikin til um tey skulu flyta.

Brockie familjan byrjaði at selja bilar beint eftir seinna verðaldarbardaga, tá teir fingu umboð fyri ensku Austin bilarnar. Í 1973 yvirtók Derek Brockie, sum er triðja ættarlið, bilverkstaðin og í 1980 bilumboðini hjá fyritøkuni Robert. P. Brockie. Teir umboðaðu tá bilmerkini hjá British Leyland Motor Company (BLMC) sum t.d. Austin, Morris, Rover, Land Rover og japansku Daihatsu.

